# Aðalorðaskifti um mentanarálitið

MENTANARÁLITIÐ
*Turið Kjølbro*

Í dag verður aðalorðaskifti á tingi um mentanarálitið, Mentan og menning, sum varð almannakunngjørt og lagt fyri tingið seinasta týsdag.

Tað er misjavnt, hvussu álitið er móttikið. Listafólk og listarliga umhvørvið hava sum heild tikið ógvuliga væl ímóti tí, hava fegnast um, at tað loksins er komið og at nú eru vónir um, at listafólk fáa betri virkiskor. Samd hava flest øll verið um, at álitið kemur dekan ov seint í hesum valskeiðnum. Eisini Signar á Brúnni, sum var hann, ið setti arbeiðið við álitinum í gongd í Mentamálastýrinum fyri fýra árum síðani, harmast um, at álitið kemur so seint. Umboð fyri Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin siga seg vilja viðgera álitið positivt. Einastu veruligu fyrivarnini koma frá Miðflokkinum og Fólkaflokkinum. Í útvarpinum seinasta mikudag segði Jenis á Rana, at hann als ikki kann taka undir við álitinum, og Jógvan á Lakjuni metti, at talan er um ógvuliga stóra peningaupphædd. Hann setti spurnartekin við, hvussu pengarnir verða býttir út og hvat rindað mentan í grundini er fyri nakað.


*Petur Petersen, aðalstjóri og Óli Holm, landsstýrismaður, við Mentanarálitinum*

## Álitið

Í høvuðsheitum byggir mentanarpolitikkurin, sum skotin verður upp í álitinum, á tveir aðalhyrnissteinar, nevniliga ein umskipaðan Mentunargrunn Landsins og á uppskot um at skipa listaøkið við listaráðum. Mentunargrunnurin skal vera flaggskipað, tá ið umræður útinnandi list, men hann skal umskipast til ein lista-, mentanar-, og filmsgrunn, og játtanin til grunnin skal økjast munandi. Sambært álitinum skal hann ráða yvir 9 mió. krónum í 2006.

Umframt verður skotið upp at lata pengarnar, sum Mentamálastýrið veitir ymsum endamálum, til mentanarlívið gjøgnum løgtingslóg um stuðul til list og listarligt virksemi. Skipast skulu listaráð umboðandi allar listagreinirnar við tí endamáli, at listagreinirnar verða mentar. Eitt mentanarráð, har fólk, ið umboða ymsu ráðini, skal eisini setast.

Listafólkasamband Føroya fær eisini høga raðfesting í álitinum. Tað skal styrkjast munandi, eisini við hægri játtan, og skrivstovan hjá felagnum skal gerast til eina tænastu og ráðgevingarmiðstøð hjá føroyskum listafólkum.

Álitið leggur eisini upp til størri samvinnu millum mentan og vinnulív, og á eitt økt samstarv millum listaøkið, kommunur og lokalsamfeløg.

Mentan og menning røkkur bert um tann partin av mentanarpolitikkinum, ið snýr seg um skapandi og útinnandi list. Tískil er ætlanin, at fylgt verður upp við menningarætlanum fyri aðrar partar av mentanarpolitikkinum, eitt nú varðveiting av mentanararvinum, ítróttini, mentanartiltøk fyri børn og ung, og annað.

Verða tilmælini og uppskotini í nýggja mentunarálitinum, Mentan og menning, framd í verki, verða umleið 24 mió. krónur á hvørjum ári settar av til skapandi mentan í Føroyum um fimm ár.

Streymslit:

# Motorur á Sundi gekk fyri

**Sunnukvøldið klokkan hálvgum átta fór streymurin um alt landið uttan í Suðuroy. Orsøkin til streymslitið var, at tann eini motorurin á Sundi gekk fyri. Av tí at hesin motorurin framleiddi mest streym júst tá, fór streymurin um alt landið**


*Ein motorur á verkinum á Sundi gekk fyri sunnukvøldið, og streymurin fór um alt landið. Meira enn ein tími gekk, áðrenn tey seinastu húsarhaldini fingu ljós*

STREYMUR
*Stefan í Skorini*

Myrkur var at kalla um alt landið sunnukvøldið. Bara suðuroyingar vóru so hepnir, at teir høvdu ljós.

Streymurin fór umleið klokkan hálvgum átta, tá ein turboløðari á einum motori á verkinum á Sundi gekk fyri og motorurin slóð frá.

Um hetta mundið framleiddi júst hesin motorurin nógv mest streym, og hetta hevði við sær, at streymurin fór um alt landið.

Klæmint Weihe sigur, at tað gekk ein tími og fimtan minuttir, frá at streymurin fór, til tey seinastu fingu hann aftur.

Í Norðoyggjum fingu fólk ljós aftur rættiliga skjótt. Tey seinastu at fáa streymin vóru tey í vesturbýnum í Havn, sum máttu bíða í meira enn ein tíma.

## Settu í gongd aðrastaðni

– Okkara arbeiðsfólk settu gongd á verkini á Strond, á Eiði og á Sandoynni, so fólk fingu streymin aftur hampuliga skjótt, sigur Klæmint Weihe. Hann leggur afturat, at hetta var eitt hendiligt óhapp, ið kann koma fyri.

Hann greiðir frá, at vatnorkuverkini ikki framleiða so nógvan streym, tí lítið av vatni rennur í brunnarnar, nú lítið avfall hevur verið og kavi hevur ligið um landið. Tí verður mest dúvað uppá termisku orkuna frá dieselmotorunum.

Tá so hesin gekk fyri vegna tekniskt brek, var brádliga myrkt um alt landið.



# Mentanarálitið er til onnur at fremja

**- At aðalorðaskifti verður um mentanarálitið, nú tingið liggur í andaleypi, er valagn. Lyftið um ein mentanarpolitikk kláraði landsstýrið ikki at inna, hvørki í orðum ella verki, meðan tey høvdu møguleikan at gera nakað, sigur Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinna, sum kortini fegnast um sjálvt álitið**


*– At økja játtanina úr 9 mió. til 24 mió. krónur eftir fimm árum er realistiskt, men tað er ikki realistiskt, tá ið vit hava í huga, at skapandi mentanin ikki hevur fingið hægri játtan í ár, sigur Katrin Dahl Jakobsen*

MENTANARÁLITIÐ
*Turið Kjølbro*

– Nú hava vit bíðað í fýra ár eftir hesum álitinum, tað hevur verið boðað frá hesum í øllum løgmansrøðunum hetta valskeiðið, so einki løgið er, at fólk hava ótolnast, sigur Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinna fyri Javnaðarflokkin, sum fleiri ferðir hevur sóknast eftir álitinum.

Hon setur eisini spurnartekin við, hví mentan og list koma á skránna nú, tá ið tey ikki hava verið høgt í metum í fýra ár, meðan fýra landsstýrismenn hava skiftst um at umsita økið.

– Hendan ætlanin er til onnur at fremja. At hon kemur nú til aðalorðaskiftis, nú tingið liggur í andaleypi og liðugt er, fati eg fyrst og fremst sum valagn. Lyftið um ein mentanarpolitik kláraðu tey ikki at inna, hvørki í orðum ella verki, meðan tey høvdu møguleikan at gera nakað. Hugstoytt er, tá vit lesa, at vit eru 40 ár aftanfyri grannalondini.

## Búskaparligt íkast

Í nýggja álitinum verður fleiri ferðir víst til tað undanfarna, Avmarkaður marknaður, sum kom í 1996.

– Tað verður sagt, at nýggja álitið er ein dagføring, ískoyti og virkisætlan í mun til hitt fyrra, og at bert fá av uppskotunum frá 1996 eru sett í verk. Spurningurin er so, hví so lítið er sett í verk?

Tá tað er sagt, heldur Katrin Dahl Jakobsen, at álitið er sera gott, og at embætisfólk í Mentamálastýrinum eiga rós uppborið fyri avrikið.

– Álitið er ikki bara áhugavert viðvíkjandi menningarætlan og teimum málum, sum sett verða. Ikki minni áhugavert er søguliga og samfelagsliga baksýnið og lýsingin av mentanarpolitikkinum í Norðurlondum, sum partur av vælferðarsamfelagnum.

ingini av mentanini við javnrættindarhugtakinum, at gerast frí og fræls fyri øll, til at gerast sosialpolitiskt og búskaparligt amboð, hevur flutt okkum til at fata mentanina sum amboð til annað enn at dyrka fínmentan ella bara til uppalingar. Hetta letur upp fyri nógv størri virkisøki, og einum hugburði um, at mentan er verd annað enn tann bera dagdvølja ella verja móti ídnaðarmentanini. Hon er eisini gott búskaparligt íkast. Og eg ivist onga løtu í, at mentan og vinna kunnu ganga hond í hond, sum álitið sigur. Ella, sum franski mentamálaráðharrin Lang hevur sagt, at íløgur í mentan ikki bara styrkja medvit og sjálvskenslu. Tær eru eisini besti handilsskapur.

Katrin Dahl Jakobsen fegnast um ætlanina at styrkja Listafólkasamband Føroya

– Listafólk passa so illa inn í marknaðarbúskap. Tí er gott, at LISA sambært álitinum fer at virka meira sum fakfelag. Hetta er í samsvari við hugsjón Javnaðarfloksins um møguleik-

vinna og verja síni rættindi. Skal listarligt virksemi í størri mun gerast yrki burturav, er neyðugt at felag stendur aftan fyri, sum ikki bara er áhugafelag, men sum røkir tænastuuppgávur, ráðgevur og arbeiðir fyri rættindum hjá listafeløgum og persónum.

At Mentanargrunnur Landsins skal fevna um eitt størri øki innan listina enn higartil, er gott, um pengar fylgja við.

– Fylgja pengar ikki við, verður alt ov lítið í part, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

## Nógv gerast

Sambært álitinum skal nógv fáast frá hondini fyri árslok. Uppskot til inntøkutrygdarskipan fyri yrkislistafólk skal gerast, nevnd setast at viðgera skattligu viðurskiftini fyri yrkislistafólk, og løgtingslóg um stuðul til list og listarligt virksemi. Somuleiðis skal løgtingslóg um Mentanargrunn Landsins endurskoðast, Tjóðpallur Føroya setast á stovn 1. jan. 2004, listaráð skipast og annað.

– Skipanin við listaráðum tykist ruddilig. Her fær hvør listagrein sær høvið at viðgera síni mál og forkvinnurnar/menninir skifta orð um tey í ætlaða Mentanarráðnum. Møguliga eru ráðini ov stór. Mest umráðandi er tó, at ikki mótstríðandi áhugamál darva arbeiðinum, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

## Viljin

Tann sannroynd, at skapandi listin ikki hevur fingið meiri pening á hesu fíggjarlógini í mun til ta í fjør, ger, at Katrin Dahl Jakobsen ivast í, um vilji er aftan fyri álitið.

– At økja játtanina úr 9 mió. til 24 mió. krónur eftir fimm árum er realistiskt, men tað eg ikki realistiskt, tá ið vit hava í huga, at skapandi mentanin ikki hevur fingið hægri játtan í ár.

– Hvussu stórur viljin innast inni er, sigur vantandi undirtøkan, sum vit hava fingið fyri okkara broytingaruppskotum til fíggjarlóg, serliga frá tjóðveldisflokkinum. Seinast skutu vit upp at hækka játtanina til Leikpall Føroya, men gakk. Musikskúlan fingu andstøðan og onkur fólkafloksatkvøða bjargað 950.000 kr. í 2001.

– Javnaðarflokkurin tekur tó álitið til sín, sum vit halda vera gott, og vit hava eisini víst á gongda leið fyri mentanarligum og granskingarsamstarvi, afturat tí, vit gera hjá okkum. Álitið tekur fram, hvussu umráðandi tað er, at okkara listafólk fáa eftirútbúgving, sleppa út um landoddarnar, og møguleikar fyri útlendskum grunnum at søkja úr. Okkara hugsan er at avtala við danir um at seta á stovn tveir grunnar til slíkt samstarv, við eini 10% ella 40 mió. av niðurskurðinum uppá 366 mió. til samstarv millum tey trý londini. Hetta hevði verið gott ískoyti, og góð nytta hevði verið at havt møguleika fyri mobiliteti í ríkinum.

- Álit varð eisini skrivað í sept. 2000 um søvnini. Tann parturin, sum eitur varðveiting av mentanararvinum manglar í stóran mun at verða tikin við, um ikki í hesum álitinum. Tað tykist, sum tann parturin er farin longur út í skuggan nú enn nakrantíð.

- Bókasavnslógin er eisini gott dømi um, at summi siga seg vilja, men tá krónurnar skulu teljast, ber ikki til. Henda lóg, sum fekk sjálvt løgmann at øsa seg upp, men sum fór ígjøgnum uttan neyðugu játtan. Lat okkum ikki vóna, at so illa verður arbeitt í eini komandi samgongu.

# Skotbráið ov stutt

**Framsøgumaður Fólkafloksins í mentanarmálum heldur tað vera harmiligt, at mentanarálitið er lagt fram við so stuttum skotbrái, at ikki er tíð at seta seg rættiliga inn í tað, áðrenn aðalorðaskiftið verður í tinginum**

MENTANARÁLIT

Framsøgumaður Fólkafloksins í mentamálum hevði ikki lisið mentanarálitið, tá Sosialurin bað um eina viðmerking í gjár.

Jógvan á Lakjuni sigur við Sosialin, at hann hevði onga aðra viðmerking enn ta, at hann heldur tað vera sera harmiligt, at eitt so stórt mál varð lagt fram við so stuttum skotbrái til aðalorðaskifti.

– Hetta málið er so stórt, at tað átti at fingið nógv meira tíð til viðgerðar, áðrenn tað kom til aðalorðaskifti í tinginum, sigur Jógvan á Lakjuni.

Roynt varð eisini at fáa viðmerking frá Heðini Mortensen, framsøgumanni Sambandsfloksins í mentamálum, men tað eydnaðist okkum ikki at hitta hann, áðrenn blaðið fór til prentingar.

**ej**